


Tilbúgvingarstovnur Føroya

## Deildarleiðari til MRCC Tórhsavn

Tilbúgvingarstovnur Føroya søkir eftir deildarleiðara til virkisøkið MRCC Tórshavn. Deildarleiðarin fær dagligu leiðsluábyrgdina av virkisøkinum, sum fevnir um neyð- og trygdarradiotænastu, leiting og bjarging á sjónum og sjótilbúgving í breiðari merking.

**Høvuðsuppgávur**
Leiða og samskipa arbeiðið á MRCC Tórshavn, herundir

- tryggja at leiti- og bjargingarátøk lúka fyrisett mát og betrast
- tryggja fullgóða neyð- og trygdarradiotænastu
- seta í verk menningartiltøk fyri starvsfólk og samstarvspartar í sjótilbúgvingini
- samstarva um tvørgangandi uppgávur á stovninum
- virka fyri og tryggja gott samstarv við MRCC-støðir í grannalondunum
- umboða stovnin í føroyskum sum útlendskum samstarvsfora
- skiftast við varaleiðaran um at røkja uppgávuna sum bakvakt
- tryggja fullgóða umsiting av ISO 9001-góðskustýrisskipanini

**Almenn førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava hægstu nautisku útbúgving og minst 5 ára siglingstíð sum yvirstýrimaður ella skipari við handilsskipi ella aðra hægri ástøðiliga útbúgving og royndir innan eitt nú frálandavinnu. Drúgvar royndir við heilsu-, trygdar- og umhvørvisarbeiði ella royndir við leiti- og bjargingararbeiði eru ein treyt fyri at kunna røkja starvið. Innlit í góðskustýrisskipanir eru somuleiðis ein treyt.

Umsøkjarar skulu hava viðkomandi leiðsluroyndir, góð evni at fyriskipa og samstarva umframt duga at arbeiða sjálvstøðugt. Neyðugt er at hava hollan telduførleika og málkunnleika til føroyskt, danskt og enskt.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 35. lønarflokki í lønartalvu millum Tænastumannafelag landsins og Fíggjarmálaráðið. Lønin pr. 1. okt. 2006 er tilsamans 34.859,86. Afturat lønini verður viðbót fyri bakvakt goldin eftir stig 3, sum er kr. 2.986,47 um mánaðin. Starvsheitið er deildarleiðari og tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til stjóran á Tilbúgvingarstovninum. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini. Tænastustaðurin verður Tilbúgvingarstovnur Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, royndir og møgulig tilmæli skulu sendast Tilbúgvingarstovni Føroya, Anni á Hædd, stjóra, Tinghúsvegur 64, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 20. juni 2007. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Anni á Hædd, stjóra, á telefon 356610.

**Tilbúgvingarstovnur Føroya** fevnir um virkisøkini sjóbjarging, neyð- og trygdarradiotænastur, brunaumsjón og tilbúgving í breiðari merking. Høvuðsuppgávurnar hjá stovninum eru at samskipa leiting og bjarging á sjónum, tilrættalegging og samskipan av tvørgangandi tilbúgvingaruppgávum í samfelagnum, umsita brunaumsjónar¬mál, luttøka í norðurlendskum, millumlanda og altjóða samstarvi umframt at vegleiða myndugleikar, stovnar og kommunur í tilbúgvingarligum spurningum. Heimasíður: www.mrcc.fo og www.brl.fo




## Brúðarmynd

*Ein hjartans tøkk til tykkum øll, sum við gávum, fjarritum og á annan hátt gjørdi hjúnabandsdag okkara 4. apríl 2007 ógloymandi.*
***Bestu heilsanir***
***Borgarhjørt og Hans***

